# Pf. Birting tekur nú ímóti umsóknum

FØROYABANKI

Føroya Banki hevur stovnað íbirtingarfelag til at betra um umstøðurnar hjá stigtakarum at fremja burðardyggar og nýskapandi ætlanir. Endamálið við felagnum er at seta váðafúsan pening í fyrstu búningarstigini í ætlanum, sum hava góðar møguleikar fyri at skapa vøkstur og avkast.

Birting fer at leggja størsta dentin á at menna ætlanir til fíggingarverd feløg. Síðan tekur Birting seg væntandi burturúr, og eigararnir kunnu søkja sær víðari fígging frá t.d. framtaksgrunnum og íløgufeløgum.

**Fyritreytir**

- Birting skilar sær rætt til at velja minst ein lim í nevndina aftan fyri ætlanina, sum íløga verður gjørd í. Nevnd og stjórn skulu hava viðkomandi fakligar førleikar og royndir.
- Birting væntar, at stigtakarin ger munandi íløgu í ætlanina og brúkar neyðugu tíðina til at menna hana. Nevnd og stjórn verða lønt samsvarandi fíggjarligu vánunum fyri ætlanini.
- Birting treytar sær nakað størri avkast enn vanligt, við tað at talan er um váðafúsan íløgupening.
- Birting miðar ímóti at svara umsøkjarum í seinasta lagi ein mánað eftir, at umsóknin er móttikin. Er neyðugt at leita sær uttanhýsis ráðgeving, kann svartíðin gerast longri.
- Birting ger bert íløgur í ætlanir, sum verða skipaðar sum føroyskt skrásett feløg.

**Krøv til umsóknir**

Umsóknirnar skulu so væl sum gjørligt lýsa ætlanina, sum stigtakarin arbeiðir við, og sum hann ynskir Birting at seta pening í. Umsóknirnar skulu í minst lagi innihalda eina lýsing av:

- Stovnara og/ella eigara
- Møguligum øðrum íleggjarum
- Fíggjarstøðu
- Fíggjarætlan
- Framtíðarmálum

Eru ivamál ella spurningar, ber til at ringja til Corporate Finance í Føroya Banka, tel. 330 330.

**Umsóknir skulu sendast til**

P/f Birting
Føroya Banki, Corporate Finance
Húsagøta 3
100 Tórshavn

www.foroya.fo

SENDISTOVAN






Tlf. 30 10 20 · Fax 30 10 21 · vlb@vlb.fo

VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ · *TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA*


## BROYTINGARUPPSKOT

**Broyting av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu**

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 20. mai 2010 hevur samtykt broyting í almennu byggisamtyktini fyri D3-økið við Nunnuskúlan og KFUK trøðna.

Ætlaða broytingin snýr seg um eina regulering av D3-økinum við Nunnuskúlan og KFUK trøðna fyri at rætta uppá ein skeivleika í kortinum, sum helst er komin í sambandi við digitaliseringina av kortinum í 1990'árunum.

Broytingin umfatar ognirnar 806f, 806g, 806h, 807e, 808n, 808k, 813, 811 808f, 808ab, 808ae, 808ø, 808l, 808d, 809, 807a, 807b, 807f, 772b, 779a, 779f og 779g.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu serstøku byggisamtyktina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum frá 7. til og við 28. juni 2010, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 19. juli 2010.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA